# Bilar

Nr. 54 • hósdagur • 18. mars 2004 • 78. árg.


AUTO TEKNIK 2004
Fagmessen for Autobranchen
**11. - 14. marts 2004**
**Fredericia Messecenter**



*Nýggir bilar vóru eisini á Auto Teknik, her er Opel Vectra stationcar*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Auto Teknik 2004:

# Stór fakmessa hjá bilbranchuni í Fredericia

**Fakmessan hjá donsku bilbranchuni, Auto teknik 2004, var í Fredericia Messecenter í døgunum 11.-14. mars. Saman við Super Dekk var Sosialurin til framsýningina, har umleið 175 danskar fyritøkur sýndu fram tað seinasta nýggja innan amboð, eykalutir og annars alla útgerð til bilar og bilverkstaðir**


FAKMESSA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*


Fredericia. Auto Teknik er staðið, har bilbranchan í Danmark møtist at sýna fram alt tað nýggjasta, sum er komið fram, tað verið seg bæði mekanisk og elektronisk útgerð til bilar og bilverkstøð.

Auto Teknik hevur eisini áhuga í Føroyum og nógv fólk frá bilfyritøkum vitja messuna fyri at halda seg dagførd innan alt tað nýggjasta sum er komið fram.

Bilredaktiónin á Sosialinum var boðin við á messuna av dekkfyritøkuni Super Dekk í Havn.

Har var nakað fyri øll innan bilbranchuna. Til tey sum hava bilverkstaðir eru øll hond- og maskinamboð sum t.d. nýggir og framkomnir testarar av ymiskum slag og dekkmaskinur til tey nýggjastu lágprofildekkini. Eisini reingeringsamboð til hjól, motorlutir og verkstaðir, innrætting av bilverkstaði, ventilatións- og útsúgvingarskipanir.

Nógv var eisini gjørt burtur úr viðlíkahaldi av bilum, har vóru øll sløg av bonivoksi og reingeringarevnum til innan og uttan. Radio- og musikkanleggini høvdu eisini sín stóra part á messuni og alt tað nýggjasta innan útstoyt, har man nú kann broyta ljóðið eftir egnum ynski. Vit gingu runt við myndatólinum, og her er so nakað av tí vit fingu burturúr.




*Nógv fólk vitjaðu Auto Teknik í Fredericia Messecenter í døgunum frá 11. - 14. mars*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Stjórin hjá Ketner A/S, Lars Ketner, er 40 ára gamal og triði stjórin í 100 ára longu søguni hjá fyritøkuni, sum bleiv stovnað í 1904 av Axel Ketner. Hann tók við sum stjóri í 2000 eftir abban, Poul Ketner. Her er Lars Ketner við nýggju jubileumbókini, sum júst nú er útkomin. Fyritøkan selur útgerð til bilar og bátar*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*




*Nógvar fyritøkur hava eitt ellisakfar sum »trækplástur«. Her ein ein BMW Isetta frá 1959*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*





*Sjónvarpsskíggi í nakkapútunum. Gott til undirhald hjá børnum á longri túrum*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*




*Nú er nýggjast mótin at "offroadarar" skulu hava lágfrofil-dekk. Her er ein VW Touareg við 22" hjólum*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

*Moris Minor tangabilur ljóðar sum ein skemtisøga. Hesin bilurin hjá Dansk Oliegenbrug verður brúktur til framsýningar og onnur líknandi endamál*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*











*Hesin Scania bilurin dró nógv fólk til sín. Hann er flott lakkeraður við nógvari eykaútgerð uttan og innan*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Vitjan á básinum hjá Motor-magasinet, sum er største fakblaðið hjá donsku bilbranchuni - upplagið er 14.000 bløð um vikuna, f.v. Michael Nørfeldt frá Motor-Magasinet, Magnus Gunnarsson frá Sosialinum, og Fríðrikur Bláhamar frá Super Dekk*
*Mynd: Motor-magasinet*